# Menning av staðbundnum burðardygni

## -hjá bóndum

**Matframleiðsla:** landbúnaðurin nýtir teir avmarkaðu framleiðslumøguleikar, sum eru á jørðini. Húsdjórahaldið hevur neiliga ávirkan á árinið av vakstrarhúsgassum og verður mett sum ein av syndarunum á hesum øki. Í tráðanini eftir at framleiða nóg nógva føði gera vit okkum inn á umhvørvi. Vit nýta meira og meira av náttúrutilfeinginum, so hvørt sum mannaættin fjølgast, og vanar og lívsstílir broytast. Matoyðsl er vorðið alt vanligari og elvir til eyka trýst á umhvørvið og náttúrutilfeingið, við tað, at tá oyðslað verður við mati, verður eisini oyðslað við landbúnaðarlendi, vatni, orku og øðrum tilfeingi, sum verður nýtt í matframleiðsluni.

**Matvørutrygd:** Tað trýst á umhvørvið, sum er nevnt omanfyri, hevur í altjóða høpi ment hugtakið matvørutrygd. Við áhaldandi fólkavøkstri, broyttum matvanum, veðurlags-broytingum og harðnaðari kapping um jørð og tilfeingi er hugtakið matvørutrygd sett á skrá í framkomna partinum av heiminum. Matframleiðsla á okkara leiðum dúvar oftast uppá innflutt fossilt brennievni eins og handilstøð og ískoytisfóður ymsastaðni frá. Vit betra matvøru-trygdina við at minka um innflutnig av tílíkum rávørum.

**Staðbundið burðardygni:** Staðbundið burðardygni merkir, at í einum øki verða orka og nátturutilfeingi nýtt til fulnar í rímiligari javnvág bæði hjá verandi og komandi ættarliðum, bæði hjá fólki og øðrum skapningum. Tað ber til hjá bóndum á ymiskan hátt at minka um neiligu ávirkanina á umhvørvi við at leggja um til burðardyggari mannagongdir og harvið eisini spara pengar.

**Lívsringrás:** Við lívsringrás meinast, tað at fara undir burðardyggar mannagongdir, sum taka hædd fyri øllum samspæli, sum er knýtt at flutningi av vørum, har atlit er tikið til nýtslu av tilfari og orku, eins og útláti eftir allari ringrásini. Matvøruframleiðarin fær størri vælvild og sleppur lættari av við sínar vørur, við tað at hann vísir vilja til áhaldandi at virka meira umhvørvisvinarligt. Bæði hugtakið lívsringrás og lívsringrásmeting eru vorðin avgerandi í røktini av umhvørvinum. Tað er neyðugt við rannsóknum, har staðbundin framleiðsla og víðarivirking av ymiskum matvørum verður sammett við innflutning av ymiskum matvørum.

Vit kunnu náa langt, um vit bæði hugsa burðardygt og virka hareftir, bæði fíggjarliga umhvørvisliga og bæði hjá einstøkum bóndum og í landbúnaðinum sum heild:

- Tak stig til at nýta alt tøkt tilfeingi og eykaframleiðslur
- Minka um nýtslu av fossilum brennievni
- Minka um nýtslu av handilstøðum
- Minka um keyp av fossilum brennievni, handilstøðum og handilsfóðri
- Minka um nøgdirnar av burturkasti




**Þorvaldseyri** er á Suðurlandinum í Íslandi, beint undir Eyjafjallajøkli, sum øll hoyrdu um í 2010, tá hann fór at goysa. Alt lendið á Þorvaldseyri lá undir einum tjúkkum lag av svartari øsku, sum bæði elvdi til, at grøðin sveik, og at nøkur húsdjór doyðu. Hóast hesar avleiðingar av eldgosinum, avgjørdi bóndin at økja um virksemi á garðinum. Umstøðurnar á garðinum eru heilt serligar. Tey hava egið elverk og framleiða sín egna streym, tey hava heitar keldur á garðinum. Alt fóður til húsdjórini er velt á garðinum. Tey velta raps og útvinna rapsolju, sum bæði verður nýtt til matna og sum biodiesel. Tey velta grønmeti til egna nýtslu. Í NPA verkætlanini Northern Cereals eru hesi viðurskifti við staðbundnum burðardygni lýst. Útrokningar vísa, at tey spara umleið 146.000 eurur og 18 tons av vakstrarhúsgassi um árið við at fremja burðardygga tankagongd í verki.